

Steintór Rasmussen og Erik Biskopstø skulu framleiða sending úr Klaksvík, sum verður send á Rás2

# Rás2 við nýggjari sending úr Klaksvík

**SJÓNEYKAN** VERÐUR SETT Á **YMISK** ØKI OG EVNI Í **LOKALØKINUM**, NÚ **RÁS2** FER UNDIR **NÝGGJA** SENDING ÚR **KLAKSVÍK**. TVEIR GAMLIR **KENNINGAR** Í ÚTVARPSHØPI GERA **SENDINGINA**



**RÁS2**
Eirikur Lindenskov
eirikur@sos.fo

Týsdagin verður nýggj sending á skránni hjá Rás2. Talan er um sending, sum verður gjørd og send úr Klaksvík.

Rás2 hevur seinnu árini javnan sent úr Klaksvík, og nú verður seinnapartur týsdag settur av til sending úr Norðoyggjum.

– Vit hava studio og skrivstovu í Klaksvík, og vit fáa nógvar áheitanir frá fólki um at gera sendingar úr Norðoyggjum. Tað er ein orsøk til, at vit nú fara undir eina fasta sending úr Klaksvík aftur. Vit vilja eisini gjarna verða við til at seta fokus á Norðoyggjar í onkrum sendingum, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

– Vit eru sera fegin um, at vit hava fingið tveir mans at standa fyri sendingini, sum áður hava gjørt sendingar úr Norðoyggjum og sum hava innlit í lokaløkið, sigur hann.

### Fokus á lokaløkið

Tað verða Steintór Rasmussen og Erik Biskopstø, sum fara at framleiða sendingarnar. Teir hava áður gjørt útvarpssendingar – millum annað Heimabeiti, sum Útvarpið sendi úr Klaksvík í nøkur ár.

Onnur fólk frá Rás2 verða eisini við í sendingunum av og á.

Í sendingunum verður ymiskt úr lokaløkinum tikið upp. Tosað verður við fólk, sum vitja í studio, og av og á verður eisini kjak um evni, sum eru frammi.

Sendingin úr Klaksvík verður at hoyra hvønn týsdag millum klokkan 15 og 17.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **POSTUR OG SKRELL**
4 INTERVIEW: **BEINTA JACOBSEN**
6 TIPS: **NÝGGJAR LITSAMANSETINGAR**
8 KOSTUR: **SNORRI PATURSSON**
10 90 SEKUND: **RÓSA SAMUELSEN**
12 ISABELLE CARO: **ANDLITIÐ HJÁ ETINGARÓLAGNUM**
14 Í RANGASTRÚPAN: **YMISKT ÚR MIÐLUNUM**
14 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
18 TÍÐIN: HEILSA, **TØKNI OG UMMÆLI**
19 TIL ARBEIÐIS: **ANNA KATHRINA HØJGAARD**
20 TATOVERINGAR: **FJØLNIR GEIR BRAGASON**
24 BAKGRUND: **ÓTRYGGLEIKI SKUNDAR UNDIR ÁTRÚNAÐ**
26 KAPPINGAR: **VINN GÓÐAR VINNINGAR**
30 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
31 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
32 VIKUMYNDIN: **KARNIVAL Í RIO**

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Beinta Jacobsen / Ólavur J. Hansen

**KLUMMAN**



*Eyðun Klakstein*

# Koyr postin í skrell

Fyrr gingu menn um fjøll við tungum byrðum. Sveittin dreiv av teimum, tá ið teir fóru stórleypandi við leypinum á bakinum.

Nú á døgum má eitt postboð ikki stíga meira enn tvey trapputrin við einari avís.

Tá ið menn fyri hundrað árum síðani skuldu til útróðrar, tóku teir árar í hendi, og áðrenn teir vistu av, høvdu teir róð fleiri fjórðingar út á hav.

Nú á døgum skal skrellimaðurin ganga á sløttum – í mesta lagi 20 metrar frá vegnum - ígjøgnum eitt portur, sum stendur opið, fyri at heinta skrelliposan í einum góðkendum skrellistativi.

Nýggjar tíðir skapar nýggjar møguleikar – og avmarkingar. Og tað er ivaleyst gott. Heilt gott.

Og vit skulu øll spæla við. Vit skulu verða við til at effektivisera og rationalisera. Vit skulu syrgja fyri, at postmenn og skrellimenn kunnu arbeiða skjótari og léttari, og tað verða vit noydd at virða. Vit vilja jú sjálvi hava bestu og léttastu arbeiðsumstøður, sum vit kunnu fáa.

Men onkrar løtur kann tað vera eitt sindur festligt at lesa reglugerðirnar, sum eru gjørdar um at heinta skrell og at bera post út. Tað skal í øllum førum ein góður og miðvísur innsatsur til fyri at sleppa av við skrellið og fáa postin bornan til dyrnar. Tú skalt hava skrellistativ og postkasssa á røttum stað til rætta tíð og í rætta standi, og tað er ikki lukkuligt, um tú hevur eitt trapputrin ella tvey, eina brekku til húsini - ella kanska eitt afturlatið portur.

Avleiðingin av hesum er, at allar landsins inngongdir skulu dekorerast við skrellistativum og postkassum. Og hevði tað ikki verið so besverligt, so hevði tað verið frægast at koyrt portrið í skrell.

Undanfarni postverksstjóri hevði eitt hugskot um, at Posta og Rúsan kundu verið løgd saman. Tað hevði verið eitt nógv betur hugskot at lagt Posta og IRF saman. So kundu vit sjálvi farið við skrellinum og heinta postin um somu leið.

